KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 50 2005

# Dollarin viknaður – tó ikki av álvara

MARKNAÐARRÁK

Seinasta mánaðin er dollarin viknaður úr 1,16 til 1,19 fyri hvørja evru. Vit meta tó ikki, at hetta er eitt tekin um, at trupulleikin hjá USA við stóra gjaldsjavnahallinum aftur av álvara fer at seta dám á gjaldoyramarknaðin. Heldur er hetta ein lítil steðgur í einari varandi styrking av dollaranum. Ein orsøk millum aðrar til at hesa metingina er, at søguliga styrknar tað gjaldoyrað, har tann stutta rentan er hægst. Rentan í Evropa hækkaði 0,25%-stig til 2,25% fyri tveimum vikum síðani, men tað var væntað, og er tí ikki orsøkin til viknandi dollaran. Rentan í USA verður væntandi hækkað til 4,25% í hesi vikuni, so rentan í USA verður væl hægri enn tann evropiska í fleiri mánaðir aftrat. Hetta stuðlar undir, at dollarin fer at styrkna.

## Lánsbrævarentur sveiggja

Sum vanligt er í desembur verður handlað sera lítið við lánsbrøvum. Tað hevði við sær, at marknaðurin sveiggjaði nógv, men renturnar endnaðu stórt sæð óbroyttar tá vikan var úti.

## Partabrøv standa seg væl

Síðani 21. oktobur er norðurlendska partabrævavísitalið FTSE Norex 30 hækkað javnt og samt, tó við undantaki av teirri einu vikuni, tá vísitalið lækkaði 0,2%. Samlað í hesum tíðarskeiðnum er vísitalið hækkað stívliga 12%. Hetta merkir, at í ár eru partabrøvini í vísitalinum í miðal hækkaði 36%. Millum feløgini, ið hava staðið seg best er TDC, ið júst er um at verða selt. Hóast oljuprísurin er lækkaður nakað frá hæddini í septembur liggja olju- og orkutengd feløg enn millum feløgini, ið hava staðið seg best. Av tí at partabrøv, hóast jaligu gongdina, framvegis síggja áhugaverd út, sammett við aðrar íløgumøguleikar, meta vit, at partabrøv fara at standa seg lutfalsliga væl eisini komandi tíðina.

## Hesa vikuna

Hendan vikan kann gerast eitt sindur baldrut á fíggjarmarknaðunum. Tað koma fleiri týdningarmikil hagtøl, til dømis prísvøkstur báðu megin Atlantshavið og Ifo-álitistalið úr Týsklandi. Oljuprísurin hækkaði í farnu viku, og marknaðirnir eru aftur farnir at hyggja at honum. Um hann hækkar meir, kann hann tálma partabrøvum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 636,02 | 0,0% | → |
| JPY | 5,23 | -0,9% | ↓ |
| GBP | 1.106,69 | 0,4% | ↑ |
| NOK | 93,87 | -0,2% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,52 | 0,0% | → |
| Evru Lánsbrøv | 173,22 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 107,20 | 2,7% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 72,74 | 0,0% | → |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*




Kr. 298,-

Forlagið Rustarin · Tel. 505600
www.kapfarvel.com

NÁÐIVEKING
Ein bók sum má lesast
Boðskapurin broytir fólk, kirkjur og samkomur




Bókin er til sølu í bókahandlum kring landið.
Hon kostar einans 145 kr og er 310 síður.
Fæst eisini á www.logos.fo
Handlar kunnu bíleggja frá sol-ja@mail.dk
Sólja